# Reiðarafelagið fyri Farmaskip
# Nevndarfrásøgn 2017




VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Um felagið

Reiðarafelagið fyri Farmaskip (RFF) er felag fyri reiðarar og eigarar av føroyskum handilsskipum.

Endamál felagsins er at savna allar reiðarar fyri føroysk handilsskip til at útinna felags áhugamál, m.a. at gera sáttmálar við feløgini fyri manningarnar á føroyskum farmaskipum, eins og á øðrum økjum at verja felags áhugamál limanna.

RFF er limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag, og umsiting felagsins er í Vinnuhúsinum.

Hesi seinnu árini er felagið og virksemi í felagnum munandi vaksið og telur í dag 19 limir umboðandi 79 skip.

## Í nevndini í RFF sita:

Jens Meinhard Rasmussen, formaður
Hentzar Steingrímsson, næstformaður
Gunnbjørn Joensen
Rúni V. Poulsen
Jónas Sigmarsson
Sjúrður Johansen
Bogi P. Nielsen




## Yvirlit yvir limirnar:

All Oceans Logistics Sp/F
Bal-Bulk P/F
Bakkafrost Farming
Faroe Ship P/f
Frakt & Sand Sp/f
Mariner Sp/f
Nolsø Shipping Sp/F
Northern Shipping Sp/f
Samskip P/f
Sandgrevstur P/F
Silver Liner Faroe Islands Sp/f
Skansi Offshore
Skipafelagið NorLines Sp/f
Smyril Line P/F
SVITZER Faroe Islands P/F
Team Beredskab Sp/F
Thor P/F
Thun Sp/F
Tindhólmur

# Felagið í tølum

Í Reiðarafelagnum fyri Farmaskip (RFF) eru nú 19 limir, sum umboða 79 skip og eina samlaða tonnagu á uml. 350.000 BT.

Ikki øll skipini í RFF eru skrásett í FAS, men tó er hetta galdandi fyri meginpartin. Nú talið av skrásetingum í FAS er meira støðugt, ger tað sama seg sostatt eisini galdandi fyri limatalið í RFF.

Ein stórur partur av reiðaríunum, sum hava skip í Altjóða Skipaskránni, lata seg umboða í RFF. Nevndin fegnast um hetta, tí tað hevur týdning at vinnan stendur saman um at fáa vinnugreinina fram á leið, soleiðis at hon alsamt gerst ein størri og týdningarmiklari partur av føroyska vinnulandslagnum.

Hóast ikki øll skip og allar lønir í vinnugreinini eru undir FAS, eru hesar lønir tó ein góð ábending um, at lønarinntøkurnar úr vinnugreinini eru týdningarmiklar fyri føroyska samfelagið.

Á grafinum niðanfyri sæst, at lønirnar, sum eru útgoldnar undir FAS, eru vaksnar støðugt, men at gongdin nú er meira jøvn. Lønarinntøkurnar eru meira enn tvífaldaðar hesi árini síðan 2010, og gevur shipping og FAS-skipanin sostatt eitt munandi ískoyti til peningarenslið inn til Føroya.

Sum sæst á stabbamyndini niðanfyri, so eru eisini á landi rættuliga fitt av starvsfólki, sum eru tengd at vinnugreinini. Mett verður, at útvið 300 fólk á landi hava sín vinnuveg í einum reiðarii, sum er limur í RFF.

Á sjónum er talan um útvið 1350 sjófólk. Av hesum eru umleið 600 føroyingar, knapt 400 úr hinum norðanlondunum og umleið 350 aðrastaðni frá.

Skipini hjá limareiðaríunum í RFF virka í Norður-Europa, Norður-Amerika, Afrika, Indiska Havinum, stutt sagt um allan heimin, tó virka flest skip í norður-europeiskum øki.



## Sáttmálasamráðingar

Sáttmálarnir millum RFF og tey trý manningarfeløgini, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Maskinmeistarafelagið og Føroya Fiskimannafelag, gingu út 1. mars 2017.

RFF hevur tilsamans nýggju sáttmálar við tey trý manningarfeløgini. Við hvørt felag er ein høvuðssáttmáli og tveir sersáttmálar fyri ávikavist størri og smærri skip í frálandavinnu.

Onkuntíð hevur verið vanligt, at tey trý feløgini hava samráðst saman, men so var ikki í 2017. Tað eydnaðist tó at koma á mál við øllum sáttmálunum, áðrenn ov langt var farið um 1. mars, og tað fegnast RFF um.

Undirskrivað varð fyrst við Maskinmeistarafelagið hin 20. februar, síðan við Føroya Fiskimannafelag hin 10. mars og til endans við Føroya Skipara- og Navigatørfelag hin 13. mars.

Sáttmálarnir vórðu longdir við tveimum árum til 1. mars 2019 við ávísum broytingum. Eftirlønin hækkaði 1. mars 2017 til 9 % og hækkar aftur 1. mars 2018, tá hon verður 10 %. Tilsamans hækka løn og eftirløn við ávikavist 2,2 % fyrra árið og 2,3 % seinna árið.







## Styrkir føroyska samfelagið

At hava fleiri sterkar vinnugreinar er við til at gera mótstøðuførið hjá føroyska samfelagnum og búskapinum størri. Shippingvinnan er avgjørt ein av hesum vinnugreinunum.

Mett verður, at vinnugreinin umsetur fyri einar 2 milliardir árliga, og varliga kann verða mett, at umleið helmingurin av hesum er frá útflutningi. Shippingvinnan er tí ein rættuliga týdningarmikil partur av føroyska búskapinum.

Harafturat er shippingvinnan ikki einans tengd at samfelagsgongdini í Føroyum, men heldur at gongdini í heimsbúskapinum. Hetta merkir, at serliga stóru konjunktursveiggini, sum eyðkenna føroyska búskapin, verða javnað við eini slíkari vinnugrein.

Shippingvinnan hevur tørv á førleikum, sum føroyingar vanliga eru sterkir í. Her verður hugsað um vanligar førleikar innan sjóvinnu og sjóvinnuumsiting. Men harafturat hevur shippingvinnan eisini tørv á førleikum, sum eru serligir fyri shippingvinnuna, og sum eru lutfalsliga nýggir í Føroyum. Fleiri og fleiri føroyingar hava nú hesar førleikar, og hetta er eisini við til at hækka førleikarnar á føroyska arbeiðsmarknaðinum yvirhøvur og eisini innan almennu umsitingina.

Hetta gevur eisini grundarlag fyri nýggjum útbúgvingum, skeiðstilboðum o.l. í Føroyum, og hetta kann við tíðini gerast eitt áhugavert tilboð bæði til føroyingar, sum kanska annars høvdu leitað sær út um landoddarnar at nema sær kunnleika, men eisini til útlendingar, sum velja at koma hendanvegin at fáa sær útbúgving.

Nevnast kann, at RFF í hesum sambandi arbeiðir við at fáa nýggj tilboð til føroyingar, sum starvast innan shippingvinnuna á landi.



# Sjóvinna

Sjóvinnupolitikkur 2017

## Sjóvinnupolitikkur 2017

Ein altjóða shippingvinna við sæti í Føroyum krevur, at karmarnir eru teir røttu. Tað er neyðugt at taka hædd fyri, at talan er um eina altjóða vinnugrein, og at okkara kappingarneytar ikki eru í Føroyum, men um allan heim. Tí mugu vit altíð hugsa um føroyskt kappingarføri og kappingarføri hjá FAS í mun til aðrar altjóða skrásetingar.

Tað er týdningarmikið, at vit eru dagførd við altjóða reglur og sáttmálum. Og tað er týdningarmikið, at vit bara í heilt serstøkum førum hava serligar nationalar reglur. Hetta er sama fokus, sum eisini reiðarafeløgini í øðrum londum hava.

Tí fegnast RFF um, at ein yvirskipaður sjóvinnupolitikkur, har ljós verður varpa á millum annað hetta, varð gjørdur í 2017. Nú ræður um alla tíðina at hava í geyma, at Sjóvinnupolitikkurin 2017 verður miðið, sum stýrt verður eftir.

Eitt av málunum í Sjóvinnupolitikkinum er, at Føroyar liva upp til altjóða lóggávu, og at vit eru við, har avgerðirnar verða tiknar. Serliga verður Paris MoU (Paris Memorandum of Understanding) nevnt, og á fíggjarlógini fyri í ár eru longu pengar játtaðir til, at Føroyar verða partur av Paris MoU. Hetta er avgjørt eitt framstig.

Endamálið við Paris MoU er við skipaðum havnaeftirliti at sleppa av við undirmálsskip (substandard ships), og føroyskir myndugleikar verða sostatt partur av eini skipan, har atburður og góðska hjá skipum verða eftirhugt og tryggjað. Hetta er at fegnast um.

Afturat hesum eigur eisini orka at verða játtað til at luttaka í arbeiðsbólkum o.l. í millum annað IMO í so stóran mun, sum yvirhøvur gjørligt.

Í 2008 valdu Føroyar FAS til, og hetta hevur gjørt mun. Um framhaldandi rætt verður farið fram, verður shippingvinnan í enn størri mun við til at styrkja føroyska samfelagið, bæði reint búskaparliga, men eisini í mun til t.d. førleikar hjá fólki og møguleikan hjá fólki at støðast.

Sum sagt verður í visjónini í Sjóvinnupolitikkinum 2017: “*Føroysk shippingvinna skal verða ein týðandi leikari í altjóða høpi, sum skapar avkast, framburð og vælferð.*”

## Lógarbroytingar síðan seinast

Yvirskipað tekur RFF undir við lógarbroytingum, sum verða gjørdar orsakað av altjóða krøvum. Tað er tó avgerandi, at ikki strangari, dýrari ella umsitingarliga meira tyngjandi broytingar verða gjørdar einans fyri føroysk handilsskip. Altjóða kappingarførið er treytað av, at okkara skip virka undir somu reglum sum tey skip, vit kappast við.

Í nevndarfrásøgnini fyri 2016 varð víst á, at RFF ikki hevði viðmerkingar til kunngerð um barlastarvatn frá Heilsu- og Innlendismálaráðnum. Í juli 2017 kom so kunngerð um barlastarvatn fyri tann partin av altjóða sáttmálanum um barlastarvatn, sum Uttanríkis- og Vinnumálaráðið varðar av. RFF tekur yvirskipað undir við, at Føroyar seta reglurnar í altjóða sáttmálanum í gildi, og hevði tí heldur ikki viðmerkingar til hesa kunngerðina.

Kunngerð um rættin hjá sjófólki, sum er við barn, at fara av og til fría heimferð kom eisini til hoyringar. Kunngerðin nágreinar reglurnar í løgtingslóg um sjófólk, og RFF hevði ikki viðmerkingar til kunngerðina.

Tá kunngerð um luftdálking frá skipum kom til hoyringar, vísti RFF á, at felagið grundleggjandi er ímóti strangari nationalum krøvum, enn Føroyar hava bundið seg til í altjóða sáttmálum. Felagið skilti tó í hesum ítøkiliga førinum endamálið serligu ásetingunum, men mælti til, at kravið um avmarking í svávulinnihaldi fyri skip, sum liggja, skuldi verða galdandi, tá skip hava ligið 12 tímar heldur enn 2 tímar. Henda viðmerking varð ikki tikin til eftirtektar, og kunngerðin er lýst við 2 tíma marki.

Afturat hesum vinnugreinaserligu hoyringssvarum er RFF partur av teimum yvirskipaðu hoyringssvarum, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag gevur á vinnu- og arbeiðsmarknaðarpolitiska økinum.



## Samanumtikið

Samanumtikið er at siga, at tað áhaldandi er neyðugt at tryggja kappingarførið hjá føroyska handilsflotanum og shippingvinnuni.

Shippingvinnan er við til at styrka føroyska samfelagið, bæði í mun til mótstøðuføri og í mun til at vinnuliga og útbúgvingarliga landslagið verður meira fjølbroytt.

Tað er neyðugt, at bæði vinna, myndugleikar og politikarar altíð hava FAS og kappingarførið hjá FAS í huganum. Við nýggja Sjóvinnupolitikkinum hava bæði vinna og politikarar eitt felags mið at stýra eftir. Hetta hevur týdning, um vit framhaldandi ynskja framgongd í vinnugreinini. Sjóvinnupolitikkurin er eitt stórt stig framá, og nú ræður um javnan at halda eyga við, at málini, sum hann setur, verða uppfylt. At tað fyrsta, Føroyar í Paris MoU, longu er komið undir land, fegnast RFF um.

Vit mugu í felag arbeiða aktivt við tilmælunum í Sjóvinnupolitikkinum, og vit mugu luttaka aktivt í teimum altjóða fora, sum viðgera og hava týdning fyri shippingøkið.

Reiðarafelagið fyri Farmaskip er sinnað at gera sítt fyri, at Føroyar veruliga koma á heimskortið sum shippingtjóð.

**31. januar 2018**

**Nevndin í Reiðarafelagnum fyri Farmaskip**
**Jens Meinhard Rasmussen, formaður**

VINNUHÚSIÐ

HOUSE OF INDUSTRY